Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni K. Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Viðgerðartíðir hjá Útlendingastovuni

Spurningar:

1. Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at stytta viðgerðartíðirnar hjá Útlendingastovuni í málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi?

Viðmerkingar:
Dagur og Vika visti at siga tann 12. august í ár, at tá føroyskir myndugleikar á heysti í fjør yvirtóku umsitingina av arbeiðs- og uppihaldsloyvum, gjørdust bíðitíðirnar fyri avgreiðslu av málum um arbeiðs- og uppihaldsloyvi munandi longri. Deildarleiðarin á Útlendingastovuni segði í sendingini, at ein av høvuðsorsøkunum til longdu bíðitíðina er manglandi arbeiðsorka.

Stjórin í Vinnuhúsinum segði, at ongar ábendingar eru um, at bíðitíðirnar eru í ferð við at blíva styttri, og tí noyddist Vinnuhúsið at gera vart við hesa støðuna.

Eitt av endamálunum við at yvirtaka ymisk málsøki má vera, at vit sjálvi kunnu veita eina betri tænastu, eftir at málsøkið er yvirtikið. Vit hava í áravís hoyrt um, at tað var ein stórur trupulleiki, at útlendingamál ikki vóru yvirtikin. Hetta skuldi vera orsøk til eina alt ov langa viðgerðartíð, og spurnartekin hava eisini verið sett við rættartrygdina hjá umsøkjarunum. Tí gevur tað ikki meining, at viðgerðartíðin er blivin uppaftur longri, eftir at málsøkið er yvirtikið.

Gangast má út frá, at landsstýrismaðurin kennir hesa støðuna og hevur eina ætlan fyri, hvussu málið skal loysast, og tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 14. august 2025

Helgi Abrahamsen